

# ÐIR TEY HJÁLPARLEYSU SKOMM

*Børnini eru sera iðin til Petø venjingarnar. Her eru tað Markus, Marcus, Elian, Ernst, Naya, Karla og Benjamin, sum kýta seg. Heldur ikki tey fáa stuðlar ella hjálparfólk við, hóast tørvur er á t*



*Eftir døgverða venja stór børn; her er tað Ronnie, ið loftar einum bólti. Heldur ikki hann fær stuðul við*

**Sosialurin hevur tosað við fleiri foreldur, sum hava brekað børn, og trupulleikin við vantandi hjálp til venjingarnar, er eins stórur kring alt landið.**

Leo Poulsen

Nógva staðni fungera dagtilboðini til brekað børn sera illa, og børnini fáa heldur ikki stuðlar og hjálparar við til Petø venjingarnar, sum eru so alneyðugar.

### Fulla løn –eingi børn

Tað, sum ørkymlar foreldrini serliga nógv er, at tey flestu børnini antin hava stuðlar ella starvsfólk á serstovum í barnagørðum, sum eru til arbeiðis og bíða, meðan børnini eru til venjingarnar.

Grundgevingin fyri, at tey ikki sleppa við til venjingarnar, er, at fíggjarligi karmurin loyvir tí ikki. Hetta tykist tó púra hol í høvdið, tí meðan børnini eru til venjingar við foreldrum, ommum og øðrum forbarmandi sálum, sum rætta eina hjálpandi hond, ganga summir stuðlar og fólk á serstovum og bíða inntil børnini koma aftur – fyri fulla løn. Men tey sleppa ikki við til venjingarnar. Orsøkin sigst vera vantandi fíggjarlig orka.

Aðrastaðni eru stuðlarnir sendir heim, meðan venjingin er, men summi foreldur eru noydd at siga nei til venjingina, um tey ikki fáa stuðul við, og tí mugu børnini allíkavæl ansast av stuðlinum, fyri nett somu løn, sum um viðkomandi var í Klaksvík og vandi við barninum.

Tað er óskiljandi, tí tað mátti verið tað sama, hvørt stuðlar og starvsfólk eru á stovnunum við hesum børnunum, úti og ganga túr við teimum - ella um tey eru í Klaksvík til venjingar. Lønarútreiðslurnar eru tær somu óansæð –men tað er ikki líkamikið fyri børnini. Hetta eru jú børn, sum ikki mennast sum hini, men krevja nakað eyka. Tað liggur í orðunum "at hava serligan tørv", at tey hava tørv á nøkrum serligum. Millum annað venjing. Og eyka hjálp.

### Børnini tapa

Í nógv ár máttu foreldur uttanlands at venja børnini. Venjingin er nú játtað her heima og hevur seinastu trý árini verið í Klaksvík umleið halva hvørt ár. Tað hevur riggað sera væl, og foreldrini eru sera fegin um tilboðið.

Men við tað, at eingir stuðlar ella hjálparfólk nú sleppa við, verður tað sera tvørligt hjá nógvum foreldrum at fáa børnini til hesar venjingarnar.

Sosialurin veit um fleiri børn, sum hava verið noydd at siga venjingina frá sær, tí foreldrini ikki megna at fara einsamøll við børnunum. Og hjá fleiri foreldrum er tað ógjørligt at vera burturfrá arbeiði og lesnaði í vikuvís, og tá stuðlarnir ikki sleppa við, eru tey tvungin at siga nei takk til venjingina. Eisini hóast tey kenna góðu ávirkanina, venjingin hevur á børnini.

So meðan Almannastovan, kommunurnar og Stuðulsfólkaskipanin fyri børn kríggjast og hava úr at gera við at peika eftir hvørjum øðrum og tosa um vantandi pengar, so eru børnini stóru taparnir. Og tað er skomm.

## FAKTA:

- Petø er venjing til børn við serligum tørvi.
- Tað er ein venjingarháttur, sum stavar úr Ungarn.
- Tað snýr seg í stóran mun um at venja ígjøgnum spæl. Barnið ger torførar rørslur í spæli ella sangi uttan at vita av tí, og tí kennist tað ikki sum venjing.
- Tvær ferðir árliga er venjingarskeið við serkønum fólki, og í tíðini ímillum skeiðini venur barnið heima saman við teimum, sum eru um barnið.
- Eftir hvørt venjingarskeið fær barnið "heimaarbeiði", ið eru førleikar, ið skulu betrast inntil næsta skeið og hugskot til, hvussu tað kann gerast.
- Petø er meiri ein lívsstílur enn ein venjing, tí tað snýr seg um allatíðina at seta barninum krøv í gerandisdegnum, sum eru á hóskandi torleikastigi. Fullfør børn seta jú sær sjálvum krøv allatíðina. Tað megna brekaðu børnini ikki á sama hátt.
- Í trý ár hevur Petø venjingin verið royndarkoyrd í Føroyum.
- Venjingin, sum koyrir í eina viku afturat, er tann seinasta í royndartíðini og enn er óvíst, um Petøvenjingarnar halda fram.

Meira um sama evni mánadagin